


Um hóskandi boð fæst selist hesin
IVECO DAILY C35.

vippilast · krana · undir 3.500 kg
árg. 1999 · 117.000 km

Skrivligt boð kann latast Sørvágs kommunu
áðrenn 10. mars 2007.

**Sørvágs Kommuna**
www.sorvag.fo

VARÐAGØTA 8 · FO-380 SØRVÁGUR
SORVAG@SORVAG.FO · TEL 332004

---

**Mentamálaráðið**
MENTAMÁLADEILDIN

## FULLTRÚI

**Eitt áhugavert, fjølbroytt og stjálvstøðugt starv sum fulltrúi er leyst at søkja í Mentamáladeildini**

**Starvið**
Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a.:
- At fyrisita, tryggja menning og samstarv og at røkja samskiftið við stovnar og øki undir Mentamáladeildini og taka sær av málsviðgerð í hesum sambandi
- At arbeiða við verkætlanum og uppgávum
- At ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- At umsita virkisøki, sum verða løgd til fulltrúan
- At taka lut í arbeiðsbólkum
- At taka sær av málsviðgerð sum heild
- At røkja aðrar fyrisitingarligar uppgávur.

Fulltrúin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdirnar eru í samsvar við nútímans krøv.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal:
- Hava útbúgving frá lærdum háskúla
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt umframt samstarva í arbeiðsbólkum o.l.
- Vera tænastusinnaður, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni
- Dáma avbjóðingar og hava vilja til at royna nýggjar leiðir

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Mentamálaráðið arbeiðir við elektroniskari skjalahandfaring, og er fyrisitingin tí pappírsleys. Upplæring fæst í hesi skipan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir teirra.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skulu sendast til:

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. februar 2007, kl. 16.00.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú teg í samband við Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, á tlf. 35 50 50 ella 55 50 35.

Eisini ber til at vitja heimasíðu okkara **www.mmr.fo**.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Mentamálaráðið er skipað í tríggjar deildir – Mentamáladeild, Fólkaskúladeild og Vinnu- og miðnámsskúladeild – umframt ein stáp, sum veitir ráðgeving til deildirnar o.o.
**Mentamáladeildin** hevur fyrisitingina av hægri útbúgvingum, gransking, mentamálum, søvnum, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Harafturat fyrisitur deildin ávísar uppgávur viðvíkjandi kirkjuni.

---

## Fíggjarumsitari á Fiskirannsóknarstovuni

Umsitarin á Fiskirannsóknarstovuni fer í annað starv og hevur fyri fyrst søkt um farloyvi í 1 ár. Í hansara stað verður lýst eftir nýggjum umsitara.

Arbeiðið er undir stjóranum at leiða dagligu umsitingina á Fiskirannsóknarstovuni, vera fíggjarrøkil á stovninum og at vera reiðari á "Magnusi Heinason".

Fiskirannsóknarstovan er granskingarstovnur undir Fiskimálaráðnum og hevur eitt sera fjøltáttað virksemi við árliga afturvendandi uppgávum og verkætlanum yvir styttri áramál. Nærri fæst at vita um stovnin á heimasíðuni www.frs.fo. Umframt verður í løtuni arbeitt við at orða ein avrikssáttmála við Fiskimálaráðið.

Sóknast verður eftir royndum fólki við hollari ástøðiligari vitan.

Lønin er sambært royndum og útbúgving.

Nærri fæst at vita um starvið frá Hjalta í Jákupsstovu, stjóra

Umsóknir til starvið skulu stílast Fiskirannsóknarstovuni, att: Hjalti í Jákupsstovu innan 12. mars 2007. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY
Postrúm 3051, Nóatún
110 Tórshavn, Føroyar
Telf. (298) 353900
Telefax (298) 353901

---

## Volvo FH 12 lastbilur

Hevur "veksel lad" system til 7,85, 7,15 og kont. lás.
Lastin er 7,85x2,70 v/gardinum
Bilurin hevur oljufýr v/m og er annars í góðum standi
Árgang 1995
Prísur 100.000,- +mvg.

*Tlf. 21 11 11*

---

## Mál- og talutrupulleikar orsaka av heilaskaða

Talupedagogisk viðgerð og ráðgeving til fólk, ið hava fingið afasi ella dysartri.
Eisini vegleiðing og kunning til familjuna.

v/privat. prak. talupedagogi,
Lisbeth Gotved Petersen, audiologopædur, cand. phil.

Ringið 52 17 02 millum kl. 16-18 ella sms'a og eg ringi aftur.

***taluvidgerd@kallnet.fo***